# FCK verður ofta at síggja í sjónvarpinum

**Tríggir av teimum fimm fyrstu landskappingardystunum hjá Toda og teimum í nýggja kappingarárinum verða sendir beinleiðis á TV3+ rásini**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*



Í løtuni er rættuliga friðarligt í fótbóltsheiminum. Heima á landi er landskappingin í summarfrí, og í hesi vikuni venur einki føroyskt felag.

Í Noregi hava teir akkurát nú stuttan summarsteðg. Í Íslandi spæla teir av lívsins kreftum. Bara fyri tveimum árum síðani fylgdu vit væl við í, hvussu tað gekst í Íslandi. Tað gjørdu vit, tí fleiri føroyskir spælarar vóru har yviri. Teir umboðaðu ÍBV úr Vestmannaoyggjunum, ÍA úr Akranesi og Leiftur av Ólafsfirði. Nú er eingin føroyskur spælari í íslendskum fótbólti. Tað er orsøkin til, at vit einki gera burturúr tí kappingini.

Í Danmark fyrireika feløgini seg til nýggja kappingarárið, sum tað verður farið undir ólavsøkuaftan. Bara ein føroyskur spælari er í bestu deildini í Danmark, og tí er tað so upplagt, at fótbóltshugaðir føroyingar við serligum áhuga fylgja við felagnum hjá Toda Jónsson.

Sum vit áður hava sagt, so skal FCK nú leygardagin spæla venjingardyst á Bisslett í Oslo, har mótstøðuliðið verður Lyn, sum er oddalið, nú norska kappingarárið er gott og væl hálvrunnið.

Annan leygardag fer FCK at leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Tá skulu teir á heimavøllinum í Parkini spæla ímóti Brügge úr Belgia.

Í fyrsta umfarinum í superliguni skal FCK spæla á heimavølli. Ólavsøkuaftan fáa teir vitjan av Viborg FF, sum tey seinnu árini hevur staðið seg væl.

FCK er í kapping við Brøndby um at verða roknað sum størsta felagið í Danmark. Síðani Michael Laudrup 1. juli tók við sum venjari í Brøndby hevur danska pressan gjørt nógv burturúr Brøndby og nýggja venjaranum, sum hevur givið fleiri spælarum sekkin, og sum hevur broytt spælskipan frá 4–4–2 og til 3–4–3. Brøndby hevur annars í nógv ár gjørt nógv burturúr, at øll liðini í felagnum hava spælt eftir somu skipan. Frá teimum yngstu og upp til superligu liðið hava allir innrættað seg til 4–4–2.

Men Michael Laudrup er ikki hvør sum helst. Og tað man hava verið millum treytirnar, sum hann hevur fingið ígjøgnum, áðrenn hann skrivaði undir sáttmálan við Per Bjerregaard, at hann skuldi sjálvur gera av, hvussu liðið skuldi spæla. 3–4–3 spælskipanin er ikki ókend hjá Michael Laudrup. Eitt nú í Barcelona hava teir í nógv ár spælt eftir hesi skipanini. Tað hevur verið framrættað og undirhaldandi. Tað ætlar Michael Laudrup eisini, at spælið hjá Brøndby skal vera. Spurningurin er so, hvussu tað fer at roynast í verjupartinum.

### FCK í sjónvarpinum

Fyrsta ferðin í nýggja kappingarárinum, at FCK og Brøndby fara at bresta saman, verður leygardagin 24. august. Upprunaliga var ætlanin, at dysturin í Parkini skuldi spælast sunnudagin 25. august, men orsaka av at Brøndby í vikuni aftaná skal spæla undankappingardyst til Europa Cup fyri meistaralið, so hava teir biðið um, at dysturin verður fluttur ein dag fram.

Hóast nógv hevur verið tosað og skrivað um Brøndby nú í summar, so er áhugin fyri FCK framvegis stórur. Tað sæst eitt nú í, at teir á TV3 sjónvarpsrásini hava gjørt av, at í trimum av teimum fyrstu fimm umførunum, skal FCK verða annar parturin av dystunum, sum teir fara at senda beinleiðis frá.

Undanfarnu árini hevur ein dystur í hvørjum umfarinum verið spældur mánakvøld. Orsøkin hevur verið tann, at TV3+ rásin hevur sent beinleiðis frá dystinum. Nú hava teir á TV3 spurt hyggjararnar, nær teir eru mest áhugaðir at síggja dystir, sum ikki verða spældir sunnudag. Svarið var, at hjá hyggjarunum passar tað best, um dystirnir verða spældir seinnapart leygardagar. Tí hava teir á TV3 gjørt av, at ein superligu dystur skal vera leygardag, og harvið verður eingin dystur mánakvøld.

Fyrsta ferðin, at FCK verður at síggja á TV3+ rásini, verður sunnudagin 4. august. Tá skulu teir í 2. umfari spæla á útivølli ímóti Køge, sum skal royna seg í bestu deildini, eftir at teir í nógv ár hava verið í næstbestu deildini, har teir hava staðið í skugganum av hinum felagnum í kommununi. Tað felagið eitur Herføgle Boldklub, sum Jákup Mikkelsen spældi við.

Dysturin hjá FCK í Køge verður vístur seint seinnapartin sunnudagin 4. august. Næsta ferðin, at FCK verður beinleiðis í sjónvarpinum, verður sunnudagin 18. august. Í fjórða umfarinum verður FCK á útivølli ímóti FCM. Tað halda teir í TV3+ vera so mikið áhugavert, at teir hava gjørt av at senda dystin beinleiðis.

Omanfyri varð dysturin í 5. umfarinum millum FCK og Brøndby nevndur. Hann verður í Parkini leygardagin 24. august. Áhugin er longu stórur. Tað verður roknað við, at Parkin kanska fer at verða fullsett. Tey, sum ikki sleppa at síggja dystin á staðnum, hava møguleika í sjónvarpinum. TV3+ fer at senda beinleiðis. So er at vóna, at hepnið fer at verða størri hjá FCK og Toda Jónsson, enn tað var, tá liðini síðst spældu í Parkini. Ta ferðina javnaði Brøndby til 1–1, tá tað bara restaði ein lítil løta. Harvið vann Brøndby meistaraheitið. Mest umrøddu hendingarnar frá tí dystinum vóru, tá Todi Jónsson tvær ferðir varð rendur um koll í brotsteiginum hjá Brøndby, og Kim Milton Nielsen, sum í summar varð mettur at vera ein tann besti dómarin í HM endaspælinum, ikki bríkslaði fyri brotssparki.

### Todi hevur hvílt seg

Spurningurin er so, um Todi Jónsson verður við í dystunum, sum verða at síggja beinleiðis í sjónvarpinum. Tað tykist vera greitt, at um Todi verður førur fyri at spæla, so fer hann at manna FCK álopið saman við Sibusisu Zuma. Fyrr í summar varð roknað við, at Zuma ikki fór at koma aftur til FCK eftir HM kappingina. Roknað varð við, at FCK fór at fáa einar 60–70 milliónir fyri hann, men tað sær út sum um, at tað hevur verið roknað skeivt. FCK hevur einki so gott boð fingið uppá Zuma, sum saman við hinum í FCK fyrireikar seg til nýggja kappingarárið.

Í síðstu viku nevndu vit, at tað var upp á tal, at FCK skuldi skriva sáttmála við argentinskan álopsspælara, sum harvið kundi gerast kappingarneyti hjá Toda Jónsson. Men tummulin vendi niður. Ítróttarstjórin í felagnum, Niels Christian Holmstrøm segði, at argentinski spælarin var vongur og ikki meiri fjøltáttaður álopsspælari. FCK vildi ikki broyta spælskipan eftir einum spælara, og tí varð argentinski spælarin sendur víðari í Europa at finna sær arbeiði.

Kappingarneytarnir hjá Toda og Zuma um álopsplássini eru fyrst og fremst Peter Møller og Pascal Simpson. Zuma tykist eiga fyrsta rættin, og hinir báðir tykjast ikki vera størstu hóttanirnar ímóti, at Todi fær hitt plássið. Heldur eru tað lærskaðarnir, sum so ofta hava verið hervuligir og oyðileggjandi fyri fótbóltsspælið hjá Toda.

Í síðstu viku noyddist Todi aftur at taka seg úr dysti. FCK spældi fleiri dystir í Jyllandi, og longu eftir ein hálvan tíma í fyrsta dystinum kendi Todi, at tað strammaði í lærinum. Fyri at byrgja uppfyri tók hann seg av vøllinum, og síðani hevur hann ikki spælt. Leygardagin spældi FCK í Rødovre, har teir í 75 ára jubileumsdystinum hjá heimaliðnum vunnu 11–0!

Todi venur saman við liðfeløgunum, og fótbóltshugaðir føroyingar vóna, at hann verður tøkur, tá farið verður undir nýggju superliguna, og tá FCK ofta verður at síggja í sjónvarpinum.



# Terry Venables nýggjur venjari hjá Leeds

**Fyrrverandi enski landsliðvenjarin hellt, at hann hevði sungið seinasta vers sum venjari, men nú hevur hann skrivað undir sáttmála við Leeds United**

ENSKUR FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Mánamorgunin gjørdist tað greitt, hvør tað er, sum skal lyfta arvin eftir David O´Leary, sum Leeds venjari. Valið fall á roynda venjaran Terry Venables. Leeds og Terry Venables er komin ásamt um ein tveyára sáttmála, og Venables tekur við róðrinum beinanvegin.

Terry Venables hevur drúgvar royndir innan venjarayrkið. Hann hevur áður vant so stór feløg sum Barcelona, Tottenham og Middlesborough, og umframt hesi feløg, hevur eisini staðið á odda fyri australaska- og enska landsliðinum. Eftir Terry Venables gavst sum venjari hjá Middlesborough seinast summar, hevði hann ikki vænta at tikið venjarayrki uppaftur. Men eftir, at hann fekk bjóða ein sáttmála frá Leeds-leiðsluni, ið ikki kundi siga nei til, valdi hann at taka av. Eftir at sáttmálin var komin í hús, var bæði Leeds-leiðslan og nýggji venjarin ovurfegin, og báðir partar gleða seg til samstarvið.

### Nógv leysasøgur í Leeds

Seinastu tíðina hava nógvar leysasøgur verið við, at fleiri spælarar eru á veg úr Leeds. Spælarar sum Rio Ferdinand, Lee Bowyier, Mark Viduka og Robbie Keane hava allir verið settir í samband við onnur feløg. Manchester United sigst at hava bjóðað 35 milliónir pund uppá Rio Ferdinand, og í seinastu viku royndi Sunderland at ogna sær Robbie Keane, men írski framherjin vildi ikki frá Leeds. Mark Viduka hevur fleiri ferðir verið settur í samband við feløg í bæði Italia og Spania, men enn er onki ítøkiligt komið burturúr. Miðvallarin Lee Bowyer hevur ikki undirskrivað nýggjan sáttmála, og er tí settur á sølulistan. Liverpool hevur verið sett í samband við Bowyer.

# U14-landsliðið endaliga úttikið

**Í samband við kappingina í Aberdeen í næstu viku, hevur venjarin, Mathias Davidsen, úttikið endaliga hópin. Landsliðið fer avstað mánadagin 15 juli, og kemur heimaftur 22.juli.**

Føroyska U-14 landsliðið, ið skal royna seg í Aberdeen, sær soleiðis út: Pætur Jørgensen, Christian Mouritsen, Dánjal Davidsen, Hanus Samró HB. Kristian Andersen, Kristoffur Jacobsen KÍ, Jón K. Poulsen VB. Hallur Johannesen, Tommy Kruse EB/Streymur, Arnold Jacobsen, Bogi Løkin, Johan T. Davidsen, Einar Hansen NSÍ, Sam Jacobsen, Steingrím R. Hansen GÍ, Rógvi Ryggshamar LÍF, Dann Johansen MB, Sigtór A. Petersen SÍ. Venjari Mathias Davidsen, og Eli Hentze hjálparvenjari






## TB til Eiðis 31. juli

Ein dystur hongur eftir frá 10. leikumfarinum í fótbóltslandskappingini. Tað er tann millum EB-/Streym og TB. Botndysturin sunnudagin varð útsettur, tí beiggi málverjan hjá EB/Streymi doyði í syndarligu ferðsluvanlukkuni í Klaksvík leygarnáttina.

EB/Streymur bað um at fáa dystin útsettan, og sambært formannin í kappingarnevndini, Karl Vidtfeldt, so vóru tvøråmenn beinanvegin við uppá hetta. Hetta tænir TB til miklan sóma. Teir høvdu annars undan vikuskiftinum fingið spæliloyvini hjá fleiri útlendingum henda vegin. Nú vóru hesir í Føroyum, uttan at tað bar til at fáa endamálið við ferðini avgreitt.

Kappingarnevndin hevur nú gjørt av, at útsetti dysturin á Eiði skal spælast mikudagin 31. juli. Tað vil siga, at tvøråmenn skulu í fýra dagar tvær ferðir norður um at spæla landskappingardystir.

11. umfarið í landskappingini verður spælt sunnudagin 4. august. Tá verður spælt soleiðis: VB–EB/Streymur, B68–TB, KÍ–HB, B36–Skála og GÍ–NSÍ.

*jh*


## Skipasmiðjan á Skála P/F

**søkir eftir tekniskum leiðara**

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi.

Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera driftsleiðari og samskipa tær ymisku uppgávurnar.
- at vera tekniskt tengilið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar.
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum.
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga.
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum.
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð.

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv.
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir.
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert førur fyri at taka avgerðir.
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 44 11 55.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

Skipasmiðjuna á Skála
att.: Marni Olsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 31. juli 2002.

www.faroeyard.fo SKIPASMIÐJAN Á SKÁLA skala@faroeyard.fo

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og har starvast umleið 75 fólk.


Sosialurin Sosialurin i